

# Almannastovan søkir ráðgeva til Serdeildina fyri børn og ung

**Serdeildin fyri børn og ung er deild á Almannastovuni, sum veitir ráðgeving um alt landið og arbeiðir í tøttum samstarvi við økisdeildirnar, og við stuðulsskipanina fyri børn. Starvsøkið hjá deildini fevnir um ráðgeving til børn og ung við skerdum førleika og familjum teirra, viðgerð av umsóknum um stuðul og hjálpartiltøk og samstarv við aðrar stovnar, sum veita tænastur til fólk við breki og annað.**

**Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.**

Vit sóknast eftir einum sosialráðgeva ella fólki við aðrari hóskandi útbúgving, sum hevur hug og evni at arbeiða við børnum, ið bera brek og familjum teirra.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur viðkomandi eftirútbúgving.

Vit ynskja at tú hevur góðan kunnleika til sosiallóggávu og almenna fyrisiting, royndir í sosialum arbeiði, evni og vilja at samstarva og arbeiða tvørfakligt, evni at arbeiða við heildarloysnum, evni at orða teg munnliga og skrivliga og góðan telduførleika.

Ráðgevin verður partur av einum stovni, ið alla tíðina má tillaga seg broytingar í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum líggja í tíðini og framtíðini.

Starvið umfatar í høvuðsheitinum ráðgeving og vegleiðing til familjur, ið hava børn og ung, ið bera brek, umframt samstarv við aðrar fakbólkar.

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Oyvind av Skarði, deildarleiðara á telefon 35 35 10.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 27. februar 2006, kl. 9.00

Send umsóknina til:
Almannastovuna
Smyrilsvegur 20
Postboks 3096
110 Tórshavn.

KREA.FO · TEL 47 80 80

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



# Avbjóðing til byggifrøðing

Søkt verður eftir byggifrøðingi til avbjóðandi starv í Sparikassanum.

Virksemið í Føroya Sparikassi er støðugt vaksandi og tað hevur við sær støðuga menning av karmunum fyri virksemið.

Arbeiðið sum byggifrøðingur í Sparikassanum er spennandi og fjølbroytt. Vit leita eftir einum starvsfelaga, ið hevur hug og evni at samstarva og samskifta á ein jaligan hátt við bæði eksternar veitarar, leiðslu og starvsfólk. Talan er um eitt sera sjálvstøðugt starv.

Arbeiðsøkið er breitt og fevnir um leiðslu og samskipan av nýbygging og umbygging í samtakinum. Samskipan av viðlíkahaldi av deildum Sparikassans og tilrættisleggjan og samskipan av húsavørðaarbeiði hoyrir eisini til økið.

Aðrar uppgávur eru at virðismeta ognir kring landið og gera bústaðarmetingar og bústaðarlýsingar fyri samtakið.

Umsøkjarar skulu hava viðkomandi royndir, útbúgving og førleika inn byggileiðslu.

Áhugað kunnu seta seg í samband við Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðara, á tel. 348510 ella á e-mail marjun.eystberg@sparikassin.fo.

Starvið verður sett skjótast gjørligt. Lønin verður ásett eftir avtalu.

Skrivligar umsóknir skulu vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin tann 24. februar 2006.

Send umsóknina til:
FØROYA SPARIKASSI
Starvsfólkadeildin
Att.: Marjun Eystberg
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

petur & petur • 320870

Visjónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Í Sparikassanum starvast 211 fólk. Á 16 privatkunda- og 2 vinnukundadeildum kring landið veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Á marknaðardeildini starvast 6 fólk. Í samtaki Sparikassans eru tvey dótturfeløg: Húsameklarafelagið INNI og Eik Bank.

FØROYA SPARIKASSI